

# Grannskoðaramálið nú aftur í Tinganesi

**Løgmansskrivstovan vildi hava lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum at siga sær, um grundarlag er fyri at reisa tænastumannasak ímóti aðalstjórunum í Vinnumálaráðnum og Innlendismálaráðnum í sonevnda grannskoðaramálinum. Tað vil lønardeildin ikki, og tí má løgmansskrivstovan sjálv gera av, um leikluturin hjá aðalstjórunum skal kannast nærri**

Uni Arge

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur talað, og boðini eru greið, men ikki so greið innihaldsliga, sum løgmansskrivstovan hevði ynskt. Lønardeildin tekur ikki støðu til, um tænastumannasak skal reisast ímóti Arna Poulsen, aðalstjóra í Vinnumálaráðnum, og Rúna Joensen, aðalstjóra í Innlendismálaráðnum, í grannskoðaramálinum, tí tað má løgmansskrivstovan sjálv gera. Aðalstjórarnir eru í starvi undir løgmansskrivstovuni, og tí er tað eisini hon, sum skal meta, um teir hava røkt síni størv á ónøktandi hátt og tí mugu kannast, sigur lønardeildin í sínum svari.

Sostatt er grannskoðaramálið, sum løgtingsins umboðsmaður varpaði ljós á í frágreiðing 2. november í 2010, endað aftur hjá løgmanni, sum sjálvur boðaði frá í løgtinginum 11. november, at talan er um eitt sera álvarsligt mál, ið krevur, at stig verða tikin, sum tryggja, at Føroyar hava eina umsiting og eina politiska skipan, ið sømir seg einum framkomnum samfelag. Tað var eisini løgmaður sjálvur, sum fyrstur nevndi møguleikan at reisa tænastumannasak ímóti teimum báðum aðalstjórunum.

Í fyrstu syftu tók løgmansskrivstovan tað óvæntaða stig, at hon legði allan spurningin fyri lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum at taka støðu til. Løgmansskrivstovan vildi hava lønardeildina at siga sær, um grundarlag var fyri at reisa tænastumannasak ímóti aðalstjórunum, og hvat ein tílík kanning kann hugsast at enda við. Við hesum tóktist løgmansskrivstovan at vilja sleppa undan at taka støðu í málinum, men tað sleppur hon ikki, tí lønardeildin vil ikki svara teimum mest avgerandi spurningunum. Hon skrivar:

"Støðutakanin til, hvørt atburður hjá tænastumanni skal hava við sær disiplinera revsing, er tengd at eini ítøkiligari meting. Metingin er tengd at, hvat verður væntað og kravt av tænastumanninum, og tí er tað eisini tann myndugleikin, sum hevur tænastumannin í starvi, sum skal gera metingina, í hesum førinum løgmansskrivstovan í samráð við avvarðandi landsstýrismann. Tað vildi ikki verið rætt av okkum at gjørt tílíka meting, og tí fáa vit ikki svarað spurninginum, um málið ber eina tænastumannakanning, ella mett um útfallið av einari slíkari kanning."

## Politisk avleiðing

Har stendur so málið, og við útvarpið segði løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttir, leygarkvøldið, at við støði í svarinum frá lønardeildini fer løgmansskrivstovan nú at taka avgerð í málinum. Umboðsmaðurin segði í síni frágreiðing 2. november í fjør, at álvarsligir feilir og brek vóru í viðgerðini hjá Innlendismálaráðnum og Vinnumálaráðnum, tá sjey grannskoðarar fingu løggildingar uttan próvtøku. Vinnumálaráðið var ógegnugt í málinum orsakað av aðalstjóranum, men kortini virkið í málinum, og Innlendismálaráðið kúvendi í síni viðgerð og legði trýst á Skráseting Føroya.

Løgmaður bað í november í fjør løgtingið taka tey stig, sum takast skuldu í málinum, so málið kundi verða kannað til botns politiskt. Løgtingið tók løgmann upp á orðið hevur samtykt at seta niður eina grein 25-nevnd, ið skal kanna, um grundarlag er fyri at reisa rættarlig ábyrgdarmál ímóti landsstýrismonnunum í grannskoðaramálinum, Bjarna Djurholm og Jacobi Vestergaard. Fyrsti fundurin hjá grein 25-nevndini er seinnapartin í dag, so politiski parturin av málinum gongur, sum løgmaður vildi.

Spurningurin er so, hvussu verður við tí umsitingarliga partinum. Tann partin skal løgmaður sjálvur taka støðu til. Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, segði við útvarpið leygarkvøldið, at tað er sera umráðandi, at eitt álvarsmál sum at reisa tænastumannasak ímóti aðalstjórum verður viðgjørt rætt og rættvíst. Hon helt ikki, at málið er serliga einfalt, tí nógvir ymsir vinklar eru í tí, og umráðandi er tí eisini, at løgmansskrivstovan brúkar ta tíð, sum er neyðug, at viðgera málið. Hvussu leingi tað verður, kundi løgmansstjórin ikki siga.

## Verja seg

Millum skjølini, sum løgmansskrivstovan hevur at halda seg til í málinum, er frágreiðingin hjá løgtingsins umboðsmanni um grannskoðaramálið, ið staðfestir, at ógegnuga Vinnumálaráðið og Innlendismálaráðið trýstu Skráseting Føroya at útskriva løggildingarnar til grannskoðararnar. Í málinum er eisini eitt annað skjal, eitt upprit úr Vinnumálaráðnum, sum 22. desember í fjør varð latið løgmansskrivstovuni. Hetta uppritið er ein verjurøða fyri leiklutinum hjá Vinnumálaráðnum í grannskoðaramálinum.

M.a. verður í uppritinum lagdur stórur dentur á gegnisspurningin. Sagt verður, at hóast aðalstjórin var ógegnigur í málinum, so hevði hetta ikki av sær sjálvum við sær, at starvsfólkini undir honum skuldu halda seg burtur frá málinum. Víst verður til danska siðvenju um, at ráðharrar viðhvørt kunnu vera ógegnigir í málum, men at starvsfólkini undir ráðharranum tá kortini kunnu viðgera málini. Um hetta merkir, at starvsfólkini undir einum ógegnigum aðalstjóra eisini kunnu viðgera mál hóast ógegni hansara, skal løgmansskrivstovan so meta um.

Undir øllum umstøðum metti løgmansskrivstovan, tá grannskoðaramálið var fyri, at Vinnumálaráðið kundi ikki viðgera málið júst orsakað av, at aðalstjórin var ógegnigur. Tí varð málið flutt í Innlendismálaráðið. Í sínum uppriti til løgmansskrivstovuna sigur Vinnumálaráðið, at løgtingsins umboðsmaður hevur ikki nakrar próvgrundir fyri, at Vinnumálaráðið hevur umsitið ósakliga í málinum. Um hetta skal hava við sær, at málið verður slept, ella um tað skal kannast uppaftur gjøllari, m.a. við avhoyringum, ger løgmansskrivstovan eisini av.